Apríl
2018

# Átak: “Megna títt lív”

Tilmæli um tilboð til ung við víðfevndum sálarligum ella sosialum trupulleikum og álvarsligum trupulleikum av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur, samanumtøka og tilmæli ........ 2
Tilmæli ........ 3
Arbeiðsbólkur og setningur ........ 4
2. Bakstøði og lýsing ........ 6
2.1 Heildartilboð á donskum stovnum ........ 6
2.2 Politiskt ynski um samskipaði tilboð í Føroyum ........ 7
2.3 Samanumtøka – tørvurin tykist vera vaksandi ........ 8
3. Tey ungu hava tørv á einum tyssi av tillagaðum tilboðum ........ 9
3.1 Ung dømd ........ 10
3.2 Tvingsilsnýtsla í sambandi við sosialpedagogiska viðgerð ........ 11
3.3 Bústaðartilboð ........ 13
3.3.1 Samanumtøka – ein tryggur bústaður er ein fyritreyt fyri menning ........ 15
3.4 Luttøka á arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving ........ 15
3.5 Psykiatrisk viðgerð og onnur viðgerð ........ 17
3.6 Viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu ........ 18
3.6.1 Tvingsilsnýtsla í sambandi við viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu ........ 20
3.6.2 Samanumtikið – brúka tilboðini, ið eru tøk ........ 21
3.7 Neyðugt við skipaðum og tryggum fíggjarviðurskiftum ........ 22
3.7.1 Samanumtikið – viðhvørt tørvur á hjálp at umsita viðurskiftini ........ 23
3.8 Sosial sambond og frítíðarítriv týðandi leiklut ........ 23
3.9 Samstarv millum myndugleikar og skipan av tilboðnum ........ 25
4. Tilmæli um skipan av tilboði ........ 27
4.1 Tvørgeiraligt átak ........ 27
4.2 Viðgerðarætlan ........ 27
4.3 Skipan av átakinum ........ 28
4.4 Starvsfólkahópur ........ 29
4.5 Kostnaðarmeting ........ 29

# 1. Inngangur, samanumtøka og tilmæli

Landsstýriskvinnan í almannamálum hevur sett sær fyri, at ung fólk, sum hava umfatandi og samansettar sálarligar, sosialar og rúsevnatrupulleikar, skulu loftast betur enn í dag.

Myndugleikar eru samdir um, at størsti parturin av ungdóminum hevur tað gott í Føroyum, men samstundis bendir okkurt á, at tey fáu, sum hava umfatandi trupulleikar, tykjast verri fyri. Vit kunnu staðfesta, at tað eru ung fólk í Føroyum, sum hava álvarsligar trupulleikar av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu, harðskapi, prostitutión og øðrum lógarbrotum.

Orsøkirnar til, at ung fólk enda í slíkum støðum, eru sum oftast fleirfaldar og torgreiddar. Í fleiri førum er talan um børn, sum eru vaksin upp í illa virkandi familjum, har tey ikki hava fingið neyðugu umsorganina. Í øðrum førum er talan um børn við umfatandi sálarligum sjúkum ella ADHD, autismu, o.t., sum hava ilt við at fóta sær, tí tey ikki hava fingið røttu hjálpina rættstundis. Talan kann eisini vera um ung, sum ikki hava fingið staðfest nakra sálarliga sjúku ella diagnosu og sum eru vaksin upp í vælvirkandi familjum, men har talan kann vera um goymdar avbjóðingar, sum viðføra, at tey koma á skeiva leið.

Umframt hetta vísir tað seg at vera ein serlig avbjóðing, tá borgari við samansettum trupulleikum fær dóm til eftirlit hjá Almannaverkinum. Tørvur er á at skipa samstarvið við ákærumyndugleikan og Kriminalforsorgina øðrvísi, bæði áðrenn dómur er fallin, tá fyriskipanin skal fyrireikast, og meðan fyriskipanin virkar.

Fleiri skipanir gera hvør í sínum lagi sítt fyri at veita viðgerð, hjálp og stuðul. Alt ov ofta ger seg tó galdandi, at almennu fyriskipanirnar ikki røkka hesum ungu, og at viðgerðartilboðini í Føroyum ikki megna at lofta og hjálpa hesum ungu. Hetta er ein avbjóðing, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at taka í móti.

Tí setti landsstýriskvinnan í almannamálum á sumri 2017 ein arbeiðsbólk við umboðum fyri Almannamálaráðið, Heilsu- og innlendismálaráðið, Almannaverkið, Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum og Kriminalforsorgina at orða tilmæli um, hvussu hesi ungu við víðfevndum og samansettum avbjóðingum kunnu fáa ta hjálp og tann stuðul sum eru neyðug.

Arbeiðsbólkurin metir, at talan er um umleið 10 ung, sum hava samansetta tørvin, sum lýstur er í hesum tilmæli. Hetta eru ung, sum eru "kend" í skipanini. Ung, sum kanska í gjøgnum fleiri ár uttan nøktandi úrslit hava fingið ymisk stuðulstilboð, tænastur og viðgerðartilboð.

Talan er um ung, sum fyrr í stóran mun fingu tilboð á stovnum uttanlands. Í 2014 var politiska ynskið, at so nógv tilboð, sum til ber, skuldu veitast í Føroyum, og at tað bert í heilt serligum førum skuldi vera neyðugt at veita tilboð uttanlands og einans, um einki nøktandi tilboð kundi veitast í Føroyum.

Avgerðin í 2014 hevði fleiri atlit. Eitt atlit var, at børn og ung sambært Barnarættindasáttmálanum og Breksáttmálanum hava rætt til at fáa hjálp í egnum landi. Men onnur samfelagslig atlit lógu eisini til

grund fyri avgerðini. Føroyar hava vælútbúgvin fólk, sum hava ella kunnu fáa neyðugar førleikar til at veita borgarum, sum hava tørv á tí, fakliga hjálp og viðgerð. Fleiri størv innan hetta økið, kunnu viðvirka til, at hesir fakbólkar støðast í Føroyum, samstundis sum fleiri arbeiðspláss eisini hava onnur jalig hjáárin.

Politiski myndugleikin viðurkendi tó eisini, at tað í ávísum førum framvegis er neyðugt at keypa tænastur uttanlands. Hetta til tess at tryggja, at borgarin fær neyðuga og dygdargóða hjálp. Eitt nú tá diagnosan og tørvurin eru so mikið samansett, at tað ikki er fakliga ráðiligt ella møguligt at skipa tilboð her á landi. Tískil varð eisini avgjørt, at heimild framhaldandi skuldi vera til at keypa tænastu uttanlands.

Gongdin seinnu árini hevur verið tann, at tað eru skipað fleiri tilboð til børn og ung í Føroyum. Almannaverkið hevur skipað fleiri bú- og viðgerðartilboð til ung, sum hava tørv á tí. Eisini hevur Mentamálaráðið skipað serlig skúlatilboð kring landið, umframt, at Serligt Skipað Miðnám er stovnsett fyri at lofta næmingum, sum ikki megna vanliga skúlagongd á jøvnum føti við onnur børn og ung. Harumframt hevur heilsuverkið eisini raðfest psykiatriina og hevur serliga barnapsykiatriin fingið eitt munagott lyft seinnu árini. Harafturat eru stig tikin til at skipa serstaka rúsdrekkaviðgerð til børn og ung

Tvørgeiraligt samstarv hevur eisini verið á breddanum seinnu árini og eru munagóð átøk so sum Tann góða tilgongdin, áðurnevnda Serliga Skipaða Miðnám og bú- og viðgerðartilboð fyri ung við sálarligum avbjóðingum, úrslit av góðum samstarvi millum myndugleikar, stovnar og fakbólkar.

Myndugleikar og sjálvbodnir felagsskapir í Føroyum hava eisini seinnu árini lagt dent á sokallaði fyribyrgjandi átøk, eitt nú SSP, Fólkaheilsuráðið og Blái krossur, sum við upplýsing og kunning, skulu viðvirka til, at tað gerast færri ung, sum fáa trupulleikar við rúsdrekka og fremja lógarbrot.

Hóast nógvar batar, kann arbeiðsbólkurin staðfesta, at tað framvegis eru ung, sum ikki verða loftað av verandi skipanum, og fremja lógarbrot av ymiskum slagi og eru í vanda fyri sær sjálvum og fyri onnur. Tí mælir bólkurin til, at eitt serligt átak verður gjørt fyri hesi – lutfalsliga fáu – ungu, sum hava ein heilt serligan tørv.

## Tilmæli

Við støði í omanfyrinevndu viðurskiftum mælir arbeiðsbólkurin til, at landsstýrið fer undir eitt átak, sum hevur til endamáls stig- og miðvíst at lofta og hjálpa hesum ungu, sum hava umfatandi og samansettar sálarligar, sosialar og rústrupulleikar.

Vísandi til, at tað eru fleiri myndugleikar og skipanir, sum hvør í sínum lagi veita ymiskar tænastur og viðgerðir, sum hesi ungu hava tørv á, mælir arbeiðsbólkurin til, at farið verður undir at skipa eitt tvørgeiraligt átak, har hvør myndugleiki sær átekur sær sín leiklut og sín part av umfatandi uppgávuni at lofta hesum ungu.

Arbeiðsbólkurin ásannar, at tað er torført at skipa og varðveita tvørgeiralig átøk og samstarv, og tí verður mælt til, at politisk avtala verður gjørd millum avvarðandi landsstýrisfólk, sum staðfestir, at politiskur vilji er til í felag at loysa uppgávuna. Harumframt eigur avtalan at nágreina leiklutin og uppgávuna hjá einstaka myndugleikanum soleiðis, at partarnir kunnu brúka orku uppá at loysa uppgávuna, heldur enn at stríðast um uppgávu- og ábygdarbýtið.

Ítøkiliga verður mælt til, at eitt tvørfakligt og matrikkulleyst toymi – sum vit frameftir rópa Toymið - verður sett burtur av til at taka sær av teimum ungu, og at Toymið verður skipað undir Almannaverkinum við serstakari játtan til endamálið.

Uppgávan hjá Toyminum verður at fáa og varðveita samband við tey ungu og at virka sum bindilið millum tann unga og teir stovnar/myndugleikar, sum veita viðgerð og tænastur. Toymið skal tryggja, at ein viðgerðarætlan verður gjørd saman við tí unga og avvarðandi myndugleikum og stovnum. Viðgerðarætlanin skal gerast við støði í lívsstøðuni, tørvinum og ynskjunum hjá tí unga og skal fevna um fylgjandi viðurskifti:

- bústað,
- luttøku á arbeiðsmarknaðinum og/ella útbúgving,
- heilivágur/psykiatrisk viðgerð/sálarfrøðilig viðgerð
- viðgerð fyri rúsdrekka-/rúsevnamisnýtslu
- fíggjarviðurskifti
- sosial sambond og frítíðarítriv

Í hesum tilmæli verða ymisku tættirnir og tilmælini lýst nærri eins og ein meira nágreinilig kostnaðarmeting fyriliggur.

## Arbeiðsbólkur og setningur

Í arbeiðsbólkinum hava verið:

Heini Petersen og Doris Bjarkhamar, Almannamálaráðið;
Elkin Klettheyggj og Heðin Askham, Kriminalforsorgin;
Tormóður Stórá, Psykiatriski Depilin;
Fróði Jacobsen, Heilsu- og innlendismálaráðið,
Hermann Mortensen, Almannaverkið;

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur samskift við umboð fyri Bláa Kross og Frelsunarherin, sum rekur nýggja viðgerðarheimið Frælsið á Eiði, um møguleikar fyri rúsviðgerð til hesi ungu.

Bólkurin hevur samanlagt havt fýra fundir, har umboð fyri allar myndugleikar hava verið hjástødd. Arbeiðsbólkurin hevur eisini verið á vitjan í Mjørkadali og hevur m.a. eisini tosað við unglingar, sum eru í hesi støðuni og koma undir málbólkin. Johan Jansson, varastjóri á Landssjúkrahúsinum luttók á

einum fundi og Jan Simonsen, deildarstjóri í Heilsu- og innlendismálaráðnum, hevur eisini luttikið á einum fundi í arbeiðsbólkinum vegna Fróða Jacobsen.

Harumframt hava umboð fyri Almannamálaráðið havt fundir við Almannaverkið. Eisini hevur bólkurin samskift skrivliga sína millum.

Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum var at gera lýsing av og tilmæli um:

- tørvin á einum tilboði, ið loftar hesum ungu
- samstarv millum myndugleikar, herundir uppskot til ábyrgdarbýtið millum hesar myndugleikar
- slag av viðgerð og mál við viðgerðini, undir hesum eisini virðisgrundarlag
- samstarv við avvarðandi
- starvsfólkahóp
- visitatión
- kostnaðarmeting

Eftir ætlan skuldi bólkurin vera liðugur við arbeiði soleiðis, at tað kundi gerast klárt at seta í verk frá 1. januar 2018. Í sambandi við fíggjarlógararbeiðið 2018 gjørdist greitt, at landsstýriskvinnan í almannamálum mátti raðfesta onnur viðurskifti. Tilmælið er handað í apríl 2018.

# 2. Bakstøði og lýsing

Sum nevnt í innganginum er í stóran mun talan um ein bólk av ungum við avbjóðingum, sum fingu tilboð uttanlands fram til 2014, tí nøktandi tilboð ikki vóru í Føroyum. Tá varð politisk avgerð tikin um at fara undir eina tilgongd við tí endamáli at bjóða fleiri tilboð í Føroyum. Tað tykist tó sum um, at tørvurin á tilboðum til ung við samansettum og størri avbjóðingum er vaksandi. Í hesum partinum fara vit at greiða nærri frá, hvørji tilboð eru til hendan bólk, og hvussu gongdin hevur verið á økinum seinnu árini.

## 2.1 Heildartilboð á donskum stovnum

Áður var tað soleiðis, at um einki nøktandi stovnstilboð var í Føroyum, var heimild í § 16 stk. 1 í forsorgarlógini at innskriva børn og ung á stovnar ella stovnslíknandi fyriskipan, sum landsstýrið hevur gjørt avtalu við. Vanliga vóru danskir stovnar nýttir til endamálið og talan var um sokallaði heildartilboð, har tey ungu, umframt at fáa sosialpedagogiska viðgerð, búvenjing og meting um arbeiðsførleika, eisini ofta fingu psykiatriska viðgerð og skúlaundirvísing. .

Tað vóru serliga børn og ung við m.a. autismu, ADHD, sálarsjúku, depressión, atferðartrupulleikum/kriminellum atburði og/ella rúsevnamisnýtslu, sum fingu hesi tilboð í boði. Ofta var talan um, at persónar stríddust við fleiri av hesum avbjóðingum.

Í 2014 varð lógin broytt soleiðis, at § 16 einans umfatar bútilboð til persónar, ið sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast, sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í varda fyriskipan ella vera undir eftirliti ella sum treyt fyri ákæru, afturtøku ella royndarleyslating, verða settir í varda fyriskipan ella vera undir eftirliti. Rættarskipanin kann taka avgerð við dómi, rættarúrskurði ella sum ein fyristingarlig avgerð. Dómsvaldið brúkar henda møguleika, tá mett verður, at borgarin ikki er egnaður til dóm ella um mett verður, at borgarin er egnaður til dóm, men fær onki burturúr einum dómi við fongsulrevsing og tí heldur eigur at fáa eitt stovnspláss við sosialpedagogiskari viðgerð, og/ella psykiatriska viðgerð ella rúsviðgerð.

Samstundis fekk landsstýrismaðurin heimild í § 27 í forsorgarlógini til at skipa bú- og viðgerðartilboð til borgarar við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella umfatandi sosialum trupulleikum í Føroyum. § 27 heimilar eisini landsstýrismanninum at keypa tænastur uttanlands í teimum førum, tá talan er um borgarar, sum hava so mikið umfatandi og samansettar trupulleikar, at nøktandi tilboð ikki kann skipast til viðkomandi her á landi.

Lógarbroytingin staðfesti samstundis meginregluna um geiraábyrgd. Sambært geiraábyrgdini hevur Almannaverkið heimild at veita sosialpedagogiska viðgerð, men ikki sjúkrahúsviðgerð, sum er málsøki hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum ella skúla undirvísing, ið er málsøki hjá Mentamálaráðnum. Tá tilboð verða keypt uttanlands, er tó framhaldandi talan um heildartilboð, sum Almannaverkið keypir.

## 2.2 Politiskt ynski um samskipaði tilboð í Føroyum

Fyri at børn og ung, sum hava tørv á tí, framhaldandi skulu fáa heildartilboð varð í lógaruppskotinum víst á týdningin av, at viðkomandi myndugleikar – serliga Almannaverkið, Sernám og Psykiatriski depilin - fóru undir at samstarva um at fáa skipað tilboð soleiðis, at tilfeingi og førleikar kunnu samskipast tvørtur um málsøki og geirar.

Fram til 2014 var játtanin til tilboðini lógarbundin. Aftaná lógarbroytingina er játtanin til § 27 ein rakstrarjáttan og kunnu útreiðslur til bú- og viðgerstovnar ikki verða bornar, um játtan ikki er til staðar. Hetta merkir so eisini, at Almannaverkið ikki kann stovna fleiri tilboð ella keypa tilboð uttanlands, hóast borgarar hava tørv á tilboðum, um játtanin ikki er til tilboðini. Borgarar eru tískil á bíðilista til hesi tilboð.

Játtanin til § 16 í forsorgarlógini er framvegis lógarbundin, orsakað av, at Almannaverkið skal veita tilboðið, tá dómsvaldið hevur tikið avgerð.

Talvan niðanfyri vísir tal av borgarum, sum hava og fáa tilboð sambært § 16 og § 27 í forsorgarlógini og útreiðslurnar av hesum tilboðum í tíðarskeiðinum 2009 – 2018.

| *Vanlig forsorg* | *R 2009* | *R 2010* | *R 2011* | *R 2012* | *R 2013* | *R 2014* | *R 2015* | *R 2016* | *J+E 2017* | *FL 2018* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 16** | **10.616** | **15.277** | **12.791** | **10.779** | **9.996** | **1.385** | **2.957** | **4.049** | **10.705** | **8.305** |
| tal av fólki | 21 | 22 | 18 | 17 | 16 | 5 | 2 | 6 | 8 | 9 |
| hægsti dagsprísur | 5.923 | 7.303 | 5.236 | 7.339 | 4.006 | 3.740 | 4.999 | 10.644 | 8.839 | |
| lægsti dagsprísur | 685 | 691 | 1.945 | 1.692 | 2.261 | 2.542 | 3.814 | 422 | 40 | |
| | | | | | | | | | | |
| ***Trivnaðartænastur*** | *R 2009* | *R 2010* | *R 2011* | *R 2012* | *R 2013* | *R 2014* | *R 2015* | *R 2016* | *J+E 2017* | *FL 2018* |
| *§ 27 Uttanlands* | - | - | - | - | - | *3.138* | *1.855* | *1.636* | *4.250* | *5.250* |
| *tal av fólki* | | | | | | *5* | *2* | *2* | *2* | *4* |
| *hægsti dagsprísur* | | | | | | *3.642* | *3.403* | *3.516* | *6.046* | |
| *lægsti dagsprísur* | | | | | | *1.428* | *1.428* | *2.033* | *3.516* | |
| *§ 27 Føroyar* | - | - | - | - | - | *1.883* | *6.837* | *12.710* | *15.091* | *15.091* |
| *tal av fólki* | | | | | | *8* | *16* | *16* | *19* | *19* |
| *hægsti dagsprísur* | | | | | | *645* | *3.756* | *4.886* | *4.215* | |
| *lægsti dagsprísur* | | | | | | *645* | *708* | *752* | *660* | |
| **§ 27 íalt** | - | - | - | - | - | **5.021** | **8.692** | **14.346** | **19.341** | **20.341** |
| | | | | | | | | | | |
| **Tilsamans í tús. kr.** | **10.616** | **15.277** | **12.791** | **10.779** | **9.996** | **6.406** | **11.649** | **18.395** | **30.046** | **28.646** |

Talvan omanfyri vísir, at samanlagt fáa 29 borgarar tilboð í 2017 og eru hetta fleiri enn í 2009, tá 21 borgarar fingu tilboð sambært § 16. Í tíðarskeiðinum 2009-2013 vóru tað í miðal 19 borgarar, sum

fingu tilboð sambært § 16. Samlaðu útreiðslurnar til hesi tilboð eru eisini hækkaðar úr 10,6 mió.kr. í 2009 til 30 mió.kr. í 2017.[1]

Eisini vísir talvan, at fleiri tilboð eru skipað í Føroyum síðani 2014, tá avgerðin um at skipa fleiri tilboð í Føroyum varð tikin. Í dag eru 19 borgarar, sum fáa bú- og viðgerðartilboð í Føroyum sambært § 27 meðan 2 borgarar fáa tilboð uttanlands.[2] Útreiðslurnar til hesi tilboð eru hækkaðar úr 5 mió.kr. og til 19,3 mió.kr. frá 2014 og til 2017.

Hinvegin vísir talvan eisini, at talið av borgarum, sum fáa tilboð sambært § 16 er vaksandi og at útreiðslurnar til hesar fyriskipanir eru hækkaðar úr 1,4 mió.kr. til 10,7 mió. kr., í tíðarskeiðinum 2014 og til 2017. Hetta merkir, at tað eru fleiri, sum vegna dóm ella rættarúrskurð fáa tilboð og at tilboðini til hesi eru vorðin dýrari.

Mett verður, at í tíðarskeiðinum 2009-2013 vóru umleið 2 borgarar um árið sum vegna dóm ella rættarúrskurð hava fingið tilboð, meðan talið er í miðal 5 persónar um árið frá 2014 til í dag.

Um hugt verður at dagsprísi, finnast dømi um, at dagsprísurin í tíðarskeiðinum 2009 til 2013, lá frá at vera 685 kr. og upp í 7.339 kr. Tað er ójavnt, hvat hesin dagsprísurin fevndi um. Talan kann vera um sosialpedagogisk tilboð og/ella psykiatriska viðgerð, skúlaundirvísing, búvenjing og meting av arbeiðsførleika.

Í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2017 liggur dagsprísurin at vera frá 40 kr. til at vera 10.644 kr. Dagsprísurin undir § 16 og § 27 uttanlands kann framhaldandi umfata tað sama, meðan dagsprísurin fyri § 27 í Føroyum ikki umfatar skúlaundirvísing ella psykiatriska viðgerð.

## 2.3 Samanumtøka – tørvurin tykist vera vaksandi

Samanumtikið kann staðfestast, at samlaða talið av borgarum, sum fáa tænastur er hægri í dag enn í 2014, tá avgerð varð tikin um at stovna fleiri tilboð í Føroyum.  Tað eru framhaldandi borgarar, sum fáa tilboð uttanlands. Staðfestast kann eisini, at talið av borgarum, sum vegna dóm ella rættarúrskurðfáa tilboð frá Almannaverkinum er vaksandi. Samlaðu útreiðslurnar til tilboðini eru eisini hækkaðar úr 10,6 mió.kr. til 30 mió. kr. í tíðarskeiðinum 2009-2017.

[1] Útreiðslurnar í tíðarskeiðinum frá 2009 -2014 fevna um heildartilboð uttanlands, meðan útreiðslurnar av § 27 tilboðum í Føroyum frá 2014 og til 2017 einans fevna um bú- og viðgerðartilboð, sum Almannaverkið veitir

[2] Viðmerkjast skal, at á  fíggjarlógini fevnir kontoin Virksemi uttanlands eisini um útreiðslur sambært skjali A L. nr. 717 frá 18. november 1987 um heildarveiting til føroyska almannaøkið, har landskassin rindar útreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark v.m. Hesar útreiðslurnar hava onki við § 16 ella § 27 tilboð at gera og er játtanin og útreiðslurnar ikki tiknar við her. Talan eru føroyingar, sum ikki eru komnir heim til Føroyar aftur síðani 1960´-70 árini tá nógvir føroyingar fingu stovns pláss á á eitt nú Rødbygård, Ongin nýggjur borgari kemur undir hesa skipanina.

## 3. Tey ungu hava tørv á einum tyssi av tillagaðum tilboðum

Í triðja parti lýsir arbeiðsbólkurin eina røð av tilboðum, ið vit meta mugu vera til taks hjá teimum ungu, sum stríðast við hesar álvarsligu fleirtáttaðu avbjóðingar.

Í sambandi við at tilmælið varð orðað hevur arbeiðsbólkurin gjørt metingar av, hvussu mong ung talan er um, sum hava víðfevndar sálarligar og sosialar trupulleikar og samstundis eru í álvarsligum trupulleikum av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað í  løtuni eru áleið 10 ung, sum hava tørv á einum øðrvísi tilboði enn tað almenna kann bjóða í dag og sum hetta tilmælið fevnir um. Metingin byggir á royndir og vitan hjá umboðunum í arbeiðsbólkinum til tey ungu, sum javnan í sínum lívi hava verið og framvegis eru í sambandi við ymsu geirarnar: Tey ungu hava øll fingið hjálp bæði í psykiatriini og í Almannaverkinum og fleiri teirra eru kend í Kriminalforsorgini vegna lógarbrot.

Meginparturin av hesum eru mannfólk í aldrinum 18-30 ár, men arbeiðsbólkuirn metir eisini, at tað eru einstøk ung undir 18, sum høvdu havt gagn av einum øðrvísi tilboði. Talan er um ung, sum stríðast við ymiskar, samansettar og sera umfatandi trupulleikar, eitt nú:

- Sálarórógv/psykiatriska diagnosu
- Atferðartrupulleikar
- Umsorganarsvík
- Menningartarn
- Rúsdrekka ella rúsevnamisnýtslu
- Lógarbrot
- Avvíkjandi seksuellan atburð

Samanumtikið er talan um ung við víðfevndum trupulleikum, sum ikki megna at taka hond um seg sjálvan og sum harvið kunnu vera til vanda bæði fyri seg sjálvan og onnur í samfelagnum. Sum víst varð á omanfyri, eru tað eisini ung, sum eru dømd til stovnstilboð og hevur Almannaverkið skyldu til at veita teimum eitt tilboð.

Í tilgongdini at evna til hetta tilmælið, hevur arbeiðsbólkurin tosað við ung, sum sótu í varðhaldi í Mjørkadali og sum hava tilknýti til ymiskar myndugleikar. Eitt, sum tey ungu sjálvi vístu á er, at tey kenna tað sum um, at tey eru slept uppá fjall og at tey skulu brúka eina rúgvu av tíð og orku uppá at finna fram til, hvør hevur ábyrgd av hvørjum og at senda umsóknir v.m. til ymiskar myndugleikar. Teirra fatan var, at tað átti at verðið staðfest, hvør skal taka hond um tey, møta teimum, har tey eru, og sum tey kunnu venda sær til at fáa hjálp.

Kriminalforsorgin hevur víst á, at tað er ein trupulleiki, at tá tey ungu hava verið í varðhaldinum, so mangla nøktandi tilboð og møguleikar, tá tey koma út. Nøkur teirra hava ongan bústað, onnur hava onki arbeiði ella útbúgving og fella tey tískil ofta á somu óhepnu rás.

Vantandi tilboðini kunnu í roynd og veru hava ta avleiðing, at tey aftur fremja lógarbrot til tess at koma aftur í varðhaldið, tí lívið kenst so trupult, at einasti útvegur er at koma aftur í Mjørkadal, har karmarnir eru støðugir og gerandisdagurin í einari fastari legu.

Almannaverkið vísir á, at tey hava trupulleikar við at hýsa teim ungu, tí tað vanta nógv búpláss, og at tað kann vera trupult at varðveita leigumál til hesi ungu. Harumframt verður víst á, at tey ungu, sum hava búpláss, hava umfatandi tørv á eitt nú rúsevnaviðgerð og er hetta ein viðgerð, sum Almannaverkið í løtuni ikki hevur førleikar ella játtan til at veita. Eisini kann tað vera torført at fáa tey ungu í arbeiði ella í útbúgving, tí tey hava ringt við at fasthalda tilknýtið til arbeiðsmarknaðin ella útbúgvingarstovnarnar. Nógv av teim ungu hava harafturat fíggjarligar trupulleikar at dragast við orsakað av skuld. Almannaverkið hevur somuleiðis víst á, at tað eru avbjóðingar í mun til skylduna at veita teim ungu, sum eru dømd, nøktandi tilboð.

Sum lýst omanfyri hevur ein stórur partur av teimum ungu eisini viðgerðarkrevjandi psykiatriskar avbjóðingar at stríðast við. Nøkur teirra fáa viðgerð í Psykiatriini, men orsakað av, at tey ikki hava fastan bústað og í heila tikið ikki ein skipaðan og innihaldsligan gerandisdag, kann tað vera torført at veita teimum neyðuga og støðuga viðgerð.

Samanumtikið er talan um ung fólk, sum hava umfatandi, men ymiskar og samansettar trupulleikar. Tískil eisini tørv á ymiskari hjálp, viðgerð og stuðli. Felags er tó, at øll hava tørv á at fáa skipað viðurskifti viðvíkjandi:

- bústaði,
- luttøku á arbeiðsmarknaðinum og/ella útbúgving,
- heilivági/psykiatriskari viðgerð /sálarfrøðiligari viðgerð
- viðgerð fyri rúsdrekka- ella rúsevnamisnýtslu
- fíggjarviðurskiftum
- sosialum sambondum og frítíðarítrivum

Seinni verður innihaldið lýst nærri og grundgivið.

## 3.1 Ung dømd

Sum víst á í innganginum hevur Almannaverkið skyldu til at veita tilboð til persónar, sum dómsvaldið hevur avgjørt skulu hava tilboð.

Tað er dómsvaldið, ið áleggur Almannaverkinum eina skyldu, men tað er Almannaverkið, ið visiterar viðkomandi borgarar á rætta stað. Tað vil siga, at Almannaverkið skal syrgja fyri, at borgararnir fáa hóskandi tilboð, ið samsvara við tað, ið ásett er í dóminum. Almannaverkið hevur víst á, at tað eru ávísar avbjóðingar at liva upp til skylduna at veita tilboð til hesar borgarar í Føroyum.

Ein avbjóðing er samskiftið millum dómsvaldið og Almannaverkið, har tað kann ganga ov long tíð frá dómur er sagdur til at Almannaverkið fær boð um at tilboð skal veitast einum borgara. Almannaverkið hevur ikki tøk pláss á bú- og viðgerðarstovnum ella vardum bústøðum. Tískil er

neyðugt at finna pláss umframt at innihaldið í tilboðnum eisini skal skipast í hvørjum einstøkum føri. Harumframt kann tað veraa ein avbjóðing at røkka borgaranum við sosialpedagogiskari viðgerð og serliga trupult kann tað gerast, tá borgarin eisini skal hava viðgerð frá øðrum myndugleikum - eitt nú psykiatriska viðgerð ella rúsviðgerð.

Tað er eisini ógreitt, hvussu farast skal fram, um tað vísir seg, at Almannaverkið áðrenn tíðarskeiðið fyri eftirlitið er farið metir, at ongi útlit eru fyri at røkka endamálinum við fyriskipanini.

Samanumtikið metir Almannaverkið, at tørvur er á at fáa meira skipað samstarv og samskifti millum ákærumyndugleika og Kriminalforsorgina bæði áðrenn dómur er fallin, tá fyriskipanin skal fyrireikast og meðan fyriskipanin virkar.

Eisini hevur tað víst seg, at Almannaverkið hevur trupult við at handfara dómar, ið snúgva seg um sokallaða 'ungdomssanktion' sbrt. § 74 a í revsilógini. Hóast dómsvaldið hevur heimild at døma hesa revsing í Føroyum, hevur forsorgarlógin ongar heimildir, ið eru serliga ætlaðar til hesa revsing av ungum undir 18 ár. Av hesum ávum er torført hjá Almannaverkinum til fulnar at røkja skylduna at veita tilboð til hesar borgarar í Føroyum. Almannaverkið hevur tó enn møguleika at senda ávísar borgarar av landinum, men hendan loysnin er ikki altíð tann skynsamasta, sæð í mun til tørv og ressursir annars.

Almannamálaráðið ásannar, at heimildir vanta í verandi sosialu lóggávuni, og av hesum ávum er Almannamálaráðið í løtuni í holt við at gera eina tænastulóg og eina lóg um tvingsil, ið samanlagt fer at veita Almannaverkinum betri og meir fjølltáttaðar møguleikar í mun til at røkja skylduna at taka ímóti borgarum sbrt. § 16 í revsilógini smb. § 16 í forsorgarlógini.

Ítøkiliga er støðan tann, at Almannaverkið hevur tørv á fleiri heimildum, til tess at røkja skylduna sambært § 16. Meðan revsilógin í høvuðsheitum er tann sama í Føroyum og í Danmark, er stórur munur á sosialu lóggávuni í báðum londum. Eitt nú er ikki útgreinað í føroyskari lóggávu, hvussu ein lukkaður stovnur í Føroyum skal virka og á hvønn hátt ein stovnur kann læsast. Fleirtáttaðar heimildir vanta á økinum og løgtingsins umboðsmaður hevur eisini víst á hetta á síni eftirlitsvitjan á stovnum undir Almannaverkinum í 2007.

## 3.2 Tvingsilsnýtsla í sambandi við sosialpedagogiska viðgerð

Almannaverkið hevur somuleiðis víst á, at tørvur er á greiðari lógarheimild fyri at kunna taka neyðug stig, tá talan er um borgarar, sum ikki vilja ella megna at luttaka í viðgerðini á eitt nú bú- og viðgerðartilboði. Eitt nú kann tað vera torført at halda teim ungu frá rúsdrekka ella rúsevnum, sum so aftur kann hava við sær, at tann ungi ikki kann røkkast við sosialpedagogiskari viðgerð ella psykiatriskari viðgerð.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt spurningin um, hvørt tað skal vera møgulig at afturhalda ungum í bútilboðnum til sosialpedagogiska viðgerð, rúsviðgerð ella aðra viðgerð.

Á almennum grundarlagi er heimild at nýta tvingsilsinntriv skipað í forsorgarlógini við tilhoyrandi kunngerð um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum breki.

Heimild er fyri at taka avgerð um, at ein borgari skal setast á afturlatnan stovn. Sambært § 3 í kunngerð um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevndum likamligum ella sálarligum brekum eigur heimildin at seta á afturlatnan stovn tó bert at nýtast sum liður í eini viðgerðarætlan, og bert um tiltakið er alneyðugt til tess at forða fyri, at viðkomandi skaðar seg sjálvan ella onnur, og at tað ikki hevur verið møguligt á ráðiligan hátt at forða hesum við øðrum hóvligari ráðum.

Tað er somuleiðis heimild fyri at halda borgarum føstum, um støðan gerst bráðfeingis og hættislig, sum ásett er í kunngerðini.

Sum nevnt omanfyri vanta sum heild ásetingar um tvingsilsinntriv í lóggávu, galdandi fyri forsorgarlógina. Tískil eru heimildirnar hjá myndugleikanum í mun til t.d. ung, ið búgva á stovni, ið myndugleikin varðar av, skerdar. Myndugleikin hevur tó altíð rætt at nýta neyðverju og neyðrætt. Bæði hugtøkini eru skipað í revsilógini.

Neyðverja gevur myndugleikanum ein lógartryggjaðan rætt at nýta lutfalsligan tvingsil, tá starvsfólk eru undir álopi og ikki kunnu fáa hjálp frá løgregluni. Støðan skal vera bráfeingis og hættislig. Neyðrættur merkir, at ein gerð, ið vanliga er revsiverd, er órevsiverd, um so er, at gerðin verður mett neyðug til tess at forða fyri, at ein persónur ella ogn verður fyri stórum skaða. Eitt nú hava starvsfólk loyvi at bróta seg inn á eitt kamar um eldur er í ella støðan er bráðfeingis og hættislig av øðrum ávum.

Harafturat hevur myndugleikin eina heimild at skipa viðurskiftini á stovninum uttan lógarheimild. Talan er um reglur, ið snúgva seg um skilhald og sum skulu tryggja, at stovnurin virkar eftir ætlan. Hetta er galdandi fyri eitt nú búfelagsskapir, sambýli o.a.

Heimildin er torfør og liggur uppat viðurskiftum, ið annars krevja greiða lógarheimild – t.d. inntriv, ið mugu metast sum tvingsil ella frælsistøka. Folketingets Ombudsmand sigur soleiðis um evnið í einari frágreiðing frá 2010:

> Det vanskelige er imidlertid *hvad* anstaltsforholdet giver hjemmel til. For det første skal reguleringen være båret af saglige hensyn, og den må ikke gå videre end nødvendigt af hensyn til institutionens formål og virksomhed. For det andet gælder også her almindelige forvaltningsretlige grundsætninger, herunder om proportionalitet og om at forskelsbehandling skal være sagligt begrundet. Og for det tredje kan borgernes friheds- og menneskerettigheder, først og fremmest i Grundloven og Den Europæiske Menneskerettighedskonvention (EMRK), medføre nogle væsentlige begrænsninger i hvordan man ud fra anstaltsforholdet kan regulere borgernes forhold.

Tískil kann sigast, at ein stovnur kann gera reglur um nýtslu av rúsdrekka, rúsevnum og onnur viðurskifti, ið hava við stovnin at gera. Eisini nær friður skal valda á stovninum o.a. Tó er, sum nevnt omanfyri, torført hjá starvsfólki at nýta heimildina og frægasta loysnin er heldur at skipa viðurskiftini í lóggávu, soleiðis at ivi ikki er um, nær heimildin er í lagi og nær hon fer ov langt. Sum dømi ber ítøkiliga til at áseta, at heimild er í lóggávu at gera skilhaldsreglur og samstundis áseta, hvussu vítt hesar reglur kunnu fara.

## 3.3 Bústaðartilboð

Almannaverkið kann sambært forsorgarlógini veita bústaðartilboð til borgarar, sum hava týðandi likamlig ella sálarlig brek ella umfatandi sosialar trupulleikar. Bútilboðini verða skipað sum fyribils tilboð sambært § 27 og meira varandi tilboð sambært § 32.

Endamálið við fyriskipanum sambært § 27 er við viðgerð og stuðli at menna og uppbyggja sosialar og persónligar førleikar og at menna borgaran til í størst møguligan mun at klára seg sjálvan í egnum bústaði ella í einum vardum bústaði.

Varandi vardur bústaður kann sambært § 32 í forsorgarlógini veitast persónum, sum hava týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víttfevnandi sosialar trupulleikar. Bústaðirnar verða sum búfelagsskapur, sambýli ella røktarbústaður.

Harumframt veita sjálvbodnir felagsskapir serlig bútilboð til persónar við víttfevnandi sosialum trupulleikum, sum ikki eru førir fyri at útvega ella fasthalda ein varandi bústað. Serligu bútilboðini verða partvíst fíggjað av stuðli, sum sjálvbodnu felagsskapirnir fáa sambært § 32 e í forsorgarlógini.

Borgarar, sum hava ein bústaðarsosialan tørv, hava eisini møguleika fyri umvegis Almannaverkið at fáa tillutað ein bústað frá almenna bústaðarfelagnum "Bústaðir". Almannaverkið kann tilluta 5.hvørja íbúð hjá Bústøðum.

Almannaverkið hevur sambært § 16 í forsorgarlógini skyldu at veita bústaðartilboð sbrt. §§ 27 og 32 til persónar, ið sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast, sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í varda fyriskipan ella vera undir eftirliti ella sum treyt fyri ákæru afturtøku ella royndarleyslating verða settir í varda fyriskipan ella undir eftirlit. Rættarskipanin kann taka avgerð við dómi, rættarúrskurði ella sum ein fyrisitingarlig avgerð sbrt. § 49, stk. 2 í revsilógini.

Almannaverkið hevur skyldu at laga seg eftir avgerð rættarinnar og veita hesum borgarum tilboð. Í roynd og veru merkir hetta, at hesir borgarar ikki verða settir á ein bíðilista sum aðrir borgarar, ið fevndir eru av forsorgarlógini.

Almannaverkið hevur ábyrgd av, at stovnurin ella bústaðurin hevur neyðuga trygdarfyriskipan og, um neyðugt, virkar sum afturlatin stovnur ella bústaður. Á tann hátt er tað Almannaverkið, ið ítøkiliga visiterar viðkomandi borgara á rætta stað. Um Almannaverkið ikki metir seg kunna hýsa viðkomandi

undir nøktandi umstøðum, er heimild fyri, at Almannaverkið rindar fyri uppihald til borgaran á hóskandi stovni uttanlands.

Onkur av teim ungu, sum tilmælið fevnir um, hava ongan bústað, summi búgva á sofum hjá vinum og kenningum, meðan onkur hevur bústað á Herberginum, sum er skipað sambært forsorgarlógini, og sum Frelsunarherurin rekur. Eisini eru nøkur, sum búgva í sjálvstøðugari íbúð, sum tey leiga frá privatum, men hava torført við at varðveita bústaðin, orsakað av vantandi strukturi í gerandisdegnum, og tí tey hava torført við at "halda" íbúðina og at halda gjaldsavtalur v.m.

Eisini eru ung, sum búgva á bú- og viðgerðarstovni og stovnslíknandi fyriskipan, sum eru skipað sambært forsorgarlógini. Endamálið við hesum fyriskipanum er við viðgerð og stuðli at menna og uppbyggja sosialar førleikar og at menna ein borgara í størst møguligan mun at klára seg sjálvan í egnum bústaði ella í vardum bústaði.

Kriminalforsorgin kann ikki royndarleyslata fólk, uttan at tey hava hóskandi bústað. Í Danmark eru sokallaði pensionat, har tey ungu kunnu búleikast í eitt avmarkað tíðarskeið, áðrenn tey so líðandi fara út aftur. Henda møguleika hevur Kriminalforsorgin ikki í Føroyum. Tí verða tey ungu noktað royndarleyslating ella leyslatin til ivasom búpláss, sum tey hava torført við at varðveita.

Í sambandi við arbeiðið hevur arbeiðsbólkurin, sum áður nevnt, verið á vitjan í Mjørkadali. Stórur partur av hølunum har stendur óbrúktur og tað hevði borið væl til at skipa pensionat ella útslúsingartilboð, sum kundu verið atkomulig fyri bæði tey sum hava verið í varðhaldi og fyri onnur ung, sum hava líknandi avbjóðingar.

Sum lýst omanfyri eru fleiri bú- og viðgerðarstovnar skipaðir í Føroyum síðani 2014 og veitir Almannaverkið í løtuni 19 borgarum tilboð. Almannaverkið hevur víst á, at nøkur av teim ungu, sum fáa bútilboð mangla eitt nú rúsevnisviðgerð og psykiatriska viðgerð og tí hevur Almannaverkið torført við at røkka teim ungu við sosialpedagogiskari viðgerð einans.

Tørvur er tískil á, at samstarv er við aðrar myndugleikar um m.a. psykiatriska viðgerð og rúsevnisviðgerð. Víst hevur verið á dømi um gott samstarv millum Almannaverkið og Psykiatriska depilin í mun til viðgerð til ung við sálarligum trupulleikum, sum fáa tilboð á einum bú- og viðgerðarstovni, sum er skipaður sambært § 27. Endamálið við hesum tilboði er at skapa fortreytir fyri, at ung við víttfevndum sálarligum trupulleikum kunnu taka aktivan lut í egnum viðurskiftum og luttaka á jøvnum føti við onnur í samfelagnum. Dentur verður lagdur á at stuðla tí unga at fáa ein gevandi og mennandi gerandisdag við m.a. eisini at hjálpa teimum at fara undir útbúgving, koma í arbeiði ella okkurt annað.

Bú- og viðgerðarstovnurin hevur tætt samstarv og samband við Psykiatriska depilin, sum veitir teim ungu psykiatriska viðgerð og Mentamálaráðið/Sernám, ið veitir nøkrum av teim ungu skúlatilboð. Á henda hátt verður í felag miðað eftir, at tey ungu stig- og miðvíst fáa eitt sjálvstøðugt lív við einum gevandi og mennandi gerandisdegi á jøvnum føti við onnur ung.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt møguleikan fyri at skipa ein bú- og viðgerðarstovn, sum burturav skal hýsa málbólkinum í tilmælinum og er samdur um at mæla frá, at málbólkurin verður samlaður á einum stovni. Heldur skal miðast eftir, at tey ungu, sum ikki hava ein fastan bústað ella búpláss frá Almannaverkinum, fáa ein fastan bústað í sjálvstøðugari íbúð við stuðulstilboði frá Almannaverkinum og øðrum myndugleikum

Almannaverkið hevur samband við onkrar danskar stovnar, sum hava sokallaðar matrikkul leysar stovnar (verkætlanir) har starvsfólkabólkar (task-forces) skipa ymisk tilboð kring um í landinum, sum ikki eru knýtt at einum ávísum matrikli. Nøkur leiga eitt summarhús í eitt ávíst tal av vikum og viðgerðin fer so fram í nærumhvørvinum við at brúka náttúruna. Hetta kundi t.d. verið á útoyggj. Almannaverkið hevur fyrr keypt tænastur frá líknandi stovnum í Danmark og metir, at slíkar fyriskipanir kunnu skipast í Føroyum.

Forsorgarlógin heimilar, at vit eisini í Føroyum skipa líknandi tilboð. Sambært § 27 kunnu sokallaðar stovnslíknandi fyriskipanir, sum m.a. fevna um smidlig tilboð, ið eru knýtt at einum verandi tilboði, har heimabúgvandi persónar kunnu koma til ávísar fyriskipanir, ella har tilboðini, ið bú- og viðgerðarstovnur veitir, verða veitt í heiminum hjá viðkomandi.

Hinvegin metir arbeiðsbólkurin avgjørt, at myndugleikarnir eiga at taka støðií royndunum frá tí samstarvinum og arbeiðsháttinum, sum er á bú- og viðgerðarstovnunum fyri ung við sálarligum avbjóðingum, í sambandi við, at hesi ungu skulu hava eina hjálpandi hond.

### 3.3.1 Samanumtøka – ein tryggur bústaður er ein fyritreyt fyri menning

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at ein fastur bústaður er ein fyritreyt fyri, at tey ungu kunnu loftast og fáa neyðuga viðgerð. Tískil er alneyðugt at skipa soleiðis fyri, at tey ungu fáa ein virðiligan og fastan bústað.

Bólkurin mælir til, at arbeitt verður miðvíst við at útvega teim ungu ein fastan bústað og seta inn við tænastum og viðgerðum, sum gera tað møguligt hjá teim ungu at varðveita bústaðin. Mælt verður til, at arbeitt verður í størri mun við sokallaðum matrikkul leysum stovnum, sum verða skipaðir sum stovnslíknandi fyriskipanir sambært § 27 í forsorgarlógini.

Samstundis metir bólkurin, at eitt heildartilboð er avgerandi fyri, at tey ungu kunnu fáa og varðveita ein bústað. Tískil er alneyðugt at arbeitt verður miðvíst við øllum lívsins viðurskiftum rundanum borgaran soleiðis, at borgarin kann varðveita sín bústað.

## 3.4 Luttøka á arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving

Arbeiðsbólkurin er av tí fatan, at tað hevur alstóran týdning, at hesi ungu hava ein gerandisdag, sum øll onnur. At tey hava eitt arbeiði at fara til ella eru undir útbúgving. At vera virkin kann í sjálvum sær skapa størri sálarligan trivnað og nøgdsemi og er við til at fáa ein skipaðan gerandisdag. Tað er á arbeiðsplássinum ella í skúlanum at sosial bond verða knýtt og sosialar spælireglur verða lærdar.

Samanumtikið hava tey ungu, sum hetta tilboðið skal fevna um, ógvuliga trupult at fáa og varðveita eitt arbeiði av fleiri orsøkum, sum longu eru nevndar omanfyri. Tey hava tí ofta hjálp fyri neyðini.

Føroyski arbeiðsmarknaðurin er eins og í øðrum londum broyttur nakað seinnu árini. Tað eru alsamt fleiri størv, sum krevja útbúgvingar av ymiskum slagi og tað eru eisini alsamt fleiri bóklig krøv til ymiskar handaligar útbúgvingar. Harumframt verður tað í stóran mun lagt upp til, at øll í minsta lagi skulu hava eitt miðnámsskúlaprógv.

Nógv av teimum ungu hava eina trupla skúlasøgu at dragast við, tí tey hava havt torført við at fóta sær í skúlaskipanini. Nøkur av teim ungu hava ikki eitt fólkaskúlaprógv.

Tað eru ávís skúlatilboð, sum eru málrættaði til borgarar. Eitt nú bjóðar Dugni skúlatilboð, fyrireiking til 9. flokk og 9. flokk. Somuleiðis er fólkaskúlin eisini ein møguleiki. Í fleiri kommunum hevur kvøldskúlin eisini tilboð um skeið í einstøkum lærugreinum.

Gjøgnum árini hava nógv ung fingið møguleika at fáa arbeiði umborð á skipum, men í takt við, at tað eru vorðin færri skip og tøknin hevur tikið yvir fleiri funktiónir umborð, samstundis sum krøvini til manningina gerast størri, so eru tað avmarkaðir møguleikar hjá teim ungu at sleppa til sjós.

Tað hevur víst seg, at nøkur av teim ungu longu á ungum árum hava skipað eina dupulta tilveru – eina á sjónum og eina á landi. Onkur hevur ikki trupult við at vera rúsfrí, meðan tey eru á sjónum, men megna ikki tilveruna uttan at rúsa seg, meðan tey eru heima. Ein møguleiki er tí at sleppa til sjós og so fáa røttu karmarnar um gerandislívið, tá ið tey eru í landi.

Almannaverkið umsitur skipanina við arbeiðsfremjandi tiltøkum, ið hevur til endamáls at stuðla undir, at borgarar, sum hava skerdan arbeiðsførleika, men sum Almannaverkið metir kunnu uppihalda sær sjálvum, kunnu luttaka á vanliga arbeiðsmarknaðinum. Skipanin inniheldur eina røð av møguleikum fyri, at tann ungi kann fáa hjálp/stuðul/ráðgeving til at koma út á vanliga arbeiðsmarknaðin ella fara undir útbúgving.

Talan kann vera um útbúgvingar heilt frá grundini – t.v.s. ein persónur kann fáa stuðul at taka fráfaringarroynd fólkaskúlans og eisini til eftirfylgjandi útbúgvingar so miðnám, yrkisútbúgving og aðrar førleikagevandi útbúgvingar. Arbeiðsfremjandi tiltak kann eisini vera á sjálvum arbeiðsmarknaðinum við eini avklárandi arbeiðsroynd har kannað verður, hvat borgarin megnar ella arbeiðsvenjing, sum er meira sum eitt vanligt arbeiði, har Almannaverkið í eina avmarkaða tíð rindar lønina. Tillagað starv er ein varandi fyriskipan á vanliga arbeiðsmarknaðinum, har arbeiðsgevarin rindar løn fyri tað, sum arbeiðstakarin leggur eftir seg á arbeiðsplássinum, og har Almannaverkið rindar eitt lønarískoyti, soleiðis at inntøkan svarar til sáttmálaløn.

Arbeiðsfremjandi tiltøk eru vanliga ikki hóskandi til persónar, sum eru í eini misbrúksstøðu, men tað er Almannaverkið, sum metir, um viðkomandi megnar at fullføra eina útbúgving ella kann standa seg á arbeiðsmarknaðinum.

**Veiting um mánaðin eftir skatt og gjøld, sbrt. lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (umleið)**

| | |
|---|---|
| Forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum - búgva einsamøll | 11.800 |
| Forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum - sambúgvandi | 9.700 |
| 25 ár og eldri, uttan børn - búgva einsamøll | 10.200 |
| 25 ár og eldri, uttan børn - sambúgvandi | 7.600 |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr ikki hjá foreldrum | 6.500 |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr hjá foreldrum | 4.300 |

Viðm.: tey, sum hava børn, kunnu umframt veitingarnar omanfyri eisini fáa eina røð av barnastuðlum

Tey, sum eru undir  yrkisútbúgving fáa vanliga lærlingaløn (har Almannaverkið vanliga rindar ein part av lønini), men tey kunnu eisini undir ávísum umstøðum fáa sáttmálaløn. Tey, sum eru í tillagaðum starvi, fáa vanliga sáttmálaløn innan yrkið har tey arbeiða.

Seinastu árini hevur Almannaverkið arbeitt miðvíst við at skapa samband við privata og almenna arbeiðsmarknaðin og hevur eisini gott samstarv við eitt nú Dugna og Fountainhúsið, ið eru skipanir, sum hava til endamáls at hjálpa fólki at koma á arbeiðsmarknaðin aftur. Sum nevnt omanfyri er skipanin við arbeiðsfremjandi tiltøkum vanliga ikki hóskandi til persónar, sum eru í eini misbrúksstøðu, men tað er Almannaverkið, sum metir um og ger av um viðkomandi megnar at fullføra eina útbúgving ella kann standa seg á arbeiðsmarknaðinum.

Arbeiðsbólkurin metir, at ein sentral uppgáva er at stuðla teimum ungu at fáa og varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin ella útbúgvingarheimin umvegis skipanina við arbeiðsfremjandi tiltøkum og at viðvirka til, at nøkur av teim ungu, sum megna tað, fáa møguleika at fáa arbeiði umborð á skipi. Umráðandi er at fáa í lag samstarv við verandi partar á arbeiðsmarknaðinum - eitt nú Arbeiðsgevarafelagið og Reiðarafelagið fyri at skapa møguleikar, sum ikki eru so lættir at troyta í dag.

## 3.5 Psykiatrisk viðgerð og onnur viðgerð

Ein stórur partur av teimum ungu, sum tilmælið fevnir um, stríðist við viðgerðarkrevjandi psykiatriskar avbjóðingar. Sambært sjúkrahúslógini hava øll, ið búgva í Føroyum, rætt til ókeypis viðgerð frá sjúkrahúsverkinum. Rætturin til ókeypis viðgerð fevnir eisini um viðgerð í Danmark ella í einum øðrum landi, eftir nøkrum givnum reglum.

Tað vísir seg, at viðgerðin ofta er trupul, tí hon er treytað av ávísum strukturi í rammunum rundan um, t.d. um takast skal heilivágur regluliga, at møta upp til terapeutiskar samtalur ella aðra viðgerð. Samstundis er ofta nærum ein treyt fyri at onnur átøk skulu muna, at t psykiatrisku trupulleikarnir Eisini verða viðgjørdir.

Tí er eisini umráðandi, at Psykiatriski depilin og viðgerðir har, eru við í hesum átakinum. Psykiatriska viðgerðin kann tillagast eftir, hvør tørvurin er og hvar í viðgerðartilgongdini sjúklingurin er. Tað er

eisini neyðugt at skipað verður fyri greining av, hvørjir trupulleikarnir eru og viðgerðin sett í verk eftir hesum.

Psykiatriski depilin hevur møguleika at bjóða psykiatriska læknaviðgerð, sum kann umfata stuðlandi samtalur og heilivág, terapeutiskar samtalur, ergo- og fysioterapi og í ein ávísan mun musikkterapeutiska viðgerð.

Ein part av viðgerðini ber eisini til at geva í nærumhvørvinum og hugsast kann eitt tilknýti til økispsykiatriska toymið. Tað kann eisini við hvørt vera talan um sjúklingar, sum hava dóm til psykiatriska viðgerð, men viðgerðartilboðið er sum so tað sama.

Kriminalforsorgin bjóðar Anger Management, sum er eitt kognitivt skeið, út nakrar ferðir um árið. Hetta er eitt skeið til fólk, sum hava trupult við at klára konfliktstøður og ofta tríva til harðskap. Skeiðið, sum varar tvær vikur og so ein uppfylgjandi dag, hevur til endamáls at geva luttakarunum onnur amboð at taka til, enn harðskap. Kriminalforsorgin hevur sera góðar royndir av hesum, men tað stendur ikki einsamalt, um brúkarin eisini hevur rúsevnis- ella sálarligar trupulleikar. Hetta er til bólkar.

Eisini arbeiðir Kriminalforsorgin við RNR, sum stendur fyri Risk Need Responcivity. Talan er um eitt amboð til at kanna í hvønn mun tað er vandi fyri, at fólk fara at fremja nýggjan kriminalitet.

Fólk verða testað og kunnu scora lágt, miðal, høgt og sera høgt. Alt eftir, hvussu tey scora og hvar teirra ”trupulleikar” vísa seg, verður sett inn á hesum økjum. Tað kann verða hugburður, atburður, netverk, rúsevni, sálarstøða v.m. Tilgongdin í arbeiðinum eitur MOSAIK, sum er motiverandi samrøður eftir einum kognitivum leisti. Hetta er til einstaklingar.

Umframt tað bjóðar Kriminalforsorgin NADA, sum er oyraakupunktur, ið virkar linnandi fyri bæði kropsligar og sálarligar avbjóðingar/ órógv. Viðgerðin virkar eisini væl móti abstinensum. Kriminalforsorgin er sinnað at bjóða ungum, sum verða knýtt at toyminum hesar viðgerðir soleiðis at fyribyrgjast kann, at tey ungu áhaldandi koma sær út í kriminalititet og enda aftur í Mjørkadali.

### 3.6 Viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu

Rúsdrekka- og rúsevnatrupulleikar er eitt vanligt fyribrigdi hjá hesum ungu, sum hetta tilmælið viðger. Hesir trupulleikar hava við sær, at tey ungu hava trupult við at klára gerandisdagin, hava ilt við at varðveita arbeiði, skúlaskap og bústað. Harafturat er tættur samanhangur millum rús og fremjan av lógarbrotum.

Yvirskipað kann staðfestast, at viðgerðartilboðini til tey ungu eru tøk, og at spurningurin heldur er, hvussu førleikarnir verða gagnnýttir best. Tørvurin hjá teimum umleið 10 ungu í aldrinum 16 til 30 ár er sera ymiskur og sannlíkt er, at hesi menniskju eisini hava ymiskan tørv, tá ið tað kemur til rúsviðgerð.

Vit hava í Føroyum tríggjar alment stuðlaðar stovnar, ið veita rúsviðgerð. Virksemið er regulerað í avtalu millum einstaka stovnin og Heilsu- og innlendismálaráðið og fíggjað við rakstrarjáttan á fíggjarlógini. Harafturat hevur Kriminalforsorgin greitt frá, at tey ungu, sum eru í Mjørkadali, fáa tilboð um rúsviðgerð, meðan tey eru inni. Kriminalforsorgin metir ikki, at avrúsingin í sjálvum sær er ein trupulleiki. Avbjóðingin er at halda teim ungu frá rúsevnunum og at geva teimum eitt innihald í lívinum, soleiðis at tey ikki hava tørv á rúsevnunum.

Bæði Blákrossheimið og Viðgerðarstovnurin Frælsi bjóða ungum viðgerð. Heilbrigdi hevur ikki eitt serstakt tilboð til ung, men fleiri ung (tó yvir 18) hava verið í viðgerð hjá Heilbrigdi. Í hesum høpi fara vit tó at lýsa virksemið hjá Blákrossheiminum og Viðgerðarstovninum Frælsi.

Báðir stovnarnir bjóða ambulanta viðgerð og eru eisini døgnstovnar. Harafturat er møguleiki fyri, at sokallaða eftirviðgerðin – eftir avrúsingina – kann fara fram har tey ungu búleikast, um tørvur er á tí. Niðanfyri eru tey bæði tilboðini nærri greinað.

### *Blákrossheimið*

Fyrst og fremst er fatanin hjá Blákrossheiminum, at tey síggja seg kunna hava ein høvuðsleiklut í einum rúsviðgerðartilboði sum hesum. Blákrossheimið metir, at ambulanti DAT viðgerðarleisturin hóskar sera væl til hendan málbólk. DAT viðgerðin stendur fyri dialektisk adfærdsterapi og er grundað á gransking.

Í tilfari sent Heilsu- og innlendismálaráðnum vísir Blákrossheimið eisini á, at nøkur av teimum ungu helst hava tørv á einum fyribils døgntilboði. Bæði tey, ið verða innløgd, og tey, sum fáa eitt dagtilboð, høvdu havt gott av DAT, um tey uppfyltu tey inklusións- og eksklusiónskriteriu, sum heimið setir.

Blákrossheimið festir seg við, at arbeiðsbólkurin hevur tosað um eitt matrikkulleyst tilboð og halda tey, at tað hóskar eisini væl til DAT-leistin soleiðis, at Blákrossheimið tekur sær av viðgerðarpartinum og aðrir stovnar stuðla við teirra servitan.

Blákrossheimið kann sum nevnt bjóða DAT-pakkan: Tað er vikulig førleikamenning fyri bæði ung og foreldur/avvarðandi, ein-til-ein samrøður og telefontænastu 24 tímar um døgnið.

Í mun til ung, sum hava verið fyri umsorganarsviki, so fellur hetta, sambært Blákross, beint í kjarnuna av grundástøðinum undir DAT. Er talan um ung við autismu, ADHD o.l., so screena tey fyri tað, áðrenn persónurin byrjar í bólkaviðgerð. Um talan er um ung, ið ikki hava fingið staðfest sálarliga sjúku, verður altíð farið gjøgnum eina sonevnda “commitment fasu”, har screenað verður fyri ymisk sløg av sálarligum sjúkum, umframt at hugt verður eftir, hvørt tey ungu møta nevndu inklusións- og eksklusiónskriteriu, sum Blákrossheimið hevur.

Til tess at veita tilboðið krevjast sálarfrøðingar og sálarlækni. Í løtuni hevur heimið samstarv við Psykiatriska depilin um, at ein psykiatari luttekur í visitatiónini. Harafturat siga tey seg vera liðilig viðvíkjandi samstarvi, staðseting og í mun til aldur.

Í viðmerkingunum um starvsfólkaorku og kostnaðarætlan verður víst til umsóknina um at skipa DAT-ung, sum Blákrossheimið hevur sent Heilsu- og innlendismálaráðnum. Tann umsóknin er fyri tilboð ætlað einum sannlíkt breiðari bólki av ungum við rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu, tó avmarkað til tey 15 til 18 ára gomlu.

### *Viðgerðarstovnurin Frælsi*

Somuleiðis er fatanin hjá Viðgerðarheiminum Frælsi, at tey kunnu standa fyri rúsviðgerðini av teimum ungu, sum koma undir hetta átak. Málbólkurin hjá Frælsi eru ung í aldrinum 18 til 24 ár við umfatandi rústrupulleikum og smærri til moderatum sálarligum trupulleikum, eitt nú angist, tunglyndi, persónsórógv o.t.

Viðgerðartilboðið er fyrst og fremst eitt samdøgurstilboð, men eisini bjóðar stovnurin ambulantar viðtalur uttanfyri stovnin. Somuleiðis bjóðar Frælsi skeið fyri foreldur og avvarðandi. Samdøgurs-tilboðið bjóðar tíð og frið undir tryggum og skipaðum kørmum burtur frá vanliga umhvørvinum við intensivari terapi – bæði til einstaklingin og í bólki.

Viðgerðarstovnurin Frælsi bjóðar avrúsing – tá tað er medisinskt ábyrgdarfult - útgreining og viðgerð av ungum. Útgreiningin gevur viðgerðastovninum innlit í, hvør tann ungi er og hvørjar avbjóðingar viðkomandi stríðist við. Hetta er grundarlagið fyri víðari viðgerð. Tað er týðandi, at hin einstaki kennir seg tryggan og kennir seg virdan.

Millum sentralu viðurskiftini í viðgerðini er at broyta tankamynstrini hjá tí einstaka, at fáa tann unga at menna seg kensluliga og at bjóða tí unga av, so hann tekur ábyrgd fyri egnu avgerðum.
Rúsviðgerðin hjá Frelsunarherinum arbeiðir við øllum menniskjanum, tí kropsligu, sálarligu, sosialu og andaligu dimensjónini. Hetta hongur tætt saman við tí psykoterapeutisku viðgerðarfilosofiini, sum er grundtankin undir viðgerðini.

Á viðgerðarstovninum arbeiða umframt leiðaran í dag námsfrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingur og ófaklærdir náttarvaktir. Haraftrat hevur stovnurin avtalu við sálarfrøðingar og lækna eftir tørvi.

Bólkurin mælir til, at omanfyri nevndu viðgerðartilboð verða bjóðað teim ungu. Tað er torført at meta um kostnaðin av at veita hesum ítøkiliga málbólkinum viðgerð.

### 3.6.1 Tvingsilsnýtsla í sambandi við viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu

Ásannandi at tað er ein trupulleiki at fáa tey ungu í viðgerð fyri rúsdrekka – og rúsevnamisnýtslu, hevur arbeiðsbólkurin umrøtt spurningin, um tey skulu tvingast í viðgerð. Eingin lógarheimild er fyri at nýta tvingsil í sambandi við íverksetan av viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu og skal tvingsil nýtast, er neyðugt við greiðari heimild í føroyskari lóggávu.

Kjakast verður í dag um evnið í norðurlendsku miðlunum og semja er ikki um, hvørt tvingsilsinntriv ella sjálvbodnar loysnir eru frægast í mun til viðgerðina. Serliga verður kjakast um hvørt misnýtarar, ið eru við barn, skulu tvingast í viðgerð til tess at verja ófødda barnið.

Donsk kanning frá 2011 frá ‘Det nationale forskningscenter for velfærd’, ið nevnist ‘forskning om tvang i misbrugsbehandling’ frá 2011, viðger og kortleggur hettar vandamál frá norskum, svenskum og donskum sjónarhorni. Í stuttum kann sigast, at kanningin staðfestir, at tað er ymiskt, hvussu hesi viðurskifti verða fatað í hesum londum. Í Svøríki og Norra er endamálið við viðgerðini at skapa eitt sokallað ‘drug-free society’. Í Danmark verður ikki hildið, at eitt slíkt endamál letur seg gera í roynd og veru, og tískil er dentur heldur lagdur á at fremja eina miðvísa avmarking av skaðanum, ið misnýtslan skapar.

Av somu orsøk er lóggávan í hesum Norðurlondum eisini ymisk. Svenska lóggávan loyvir tvingsli um aðrir møguleikar sýnast vónleysir og misnýtarin setir sína heilsu og lív í stóran vanda. Norska lóggávan loyvir eisini tvingsli, har dentur serliga er lagdur á heimildina at nýta tvingsil móti misnýtarum, ið eru við barn og at fáa hesar í viðgerð til tess at verja ófødda barnið. Danska lóggávan hevur ikki heimild fyri at nýta tvingsil, men viðgerðarstovnar hava skyldu at geva misnýtarum, ið eru við barn, tilboð um eina avtalu, har tær sjálvbodnar lata seg viðgera undir tvingsli, um neyðugt.

Yvirskipað vísur kanningin onki eintýðugt úrslit í mun til  um tvingsil er frægari, enn ein sjálvboðin loysn. Víst verður á, at viðurskiftini, ið kanningin avdúkar eru somikið ósambærilig og torgreidd, at tað ikki er møguligt at vísa á, júst hvørjar fortreytir skulu vera til staðar, til tess at tvingsil kann sigast at vera eitt effektivt amboð ímóti rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu. Tó er semja um, at um tvingsil skal vera eitt væleydnað inntriv, krevst í minsta lagi ein vælvirkandi og resurssusterk skipan, ið kann bera borgaran víðari út í samfelagið eftir lokna viðgerð.

Í mun til arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum kann bara staðfestast, at heimild ikki er í dag fyri at nýta tvingsil í mun til at seta í verk viðgerð fyri rúsdrekka- ella rúsevnismisnýtslu. Tvingsil er altíð eitt álvarsamt inntriv og reisir nógvar spurningar, bæði í mun til rættartrygd, mannarættindi, etikk, samfelagslig virðir o.a. Mett verður neyðugt, at hetta evnið verður sett á breddan fyri seg sjálvan, soleiðis at vit fáa lýst og viðgjørt málið bæði fakliga og politiskt.
Sum nevnt er hetta eitt vandamál, ið longu er sett á breddan í teimum londum, ið vit vanliga samanbera okkum við.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at vit í fyrsta lagi fáa eina vælvirkandi skipan rundan um borgaran, ið tørvar hjálp. Eina sjálvbodna skipan, ið eggjar til hug hansara at verða rúsfríur, tekur hond um hansara ítøkiliga tørv og stimbrar undir gongdina at fáa borgaran aftur at taka ein aktivan lut í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

### 3.6.2 Samanumtikið – brúka tilboðini, ið eru tøk

Samanumtikið mælir arbeiðsbólkurin til, at viðgerðin fer fram í samstarvi við teir viðgerðarstovnar, sum longu eru. Givið er, at tørvurin hjá teimum ungu er ymiskur, og skal viðgerðartilboðið avspegla

ymiska tørvin. Tað verður mett sum ein stórur fyrimunur, at tilboðini eru flytfør, havandi í huga, at fleiri av teimum ungu kunnu fáa gagn av, at serliga tann ambulanta viðgerðin fer fram tætt at kenda umhvørvinum. Onnur hava avgjørt eisini tørv á innleggjan, og tá er eitt samdøgurspláss ein góður møguleiki.

## 3.7 Neyðugt við skipaðum og tryggum fíggjarviðurskiftum

Fíggjarliga grundarlagið hjá ungum borgarum, sum hava víðfevndar sálarligar, sosialar trupulleikar og álvarsligar trupulleikar av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu, er ofta ein stór avbjóðing. Tey ungu hava ofta trupulleikar at fáa og at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Forsorgarlógin er sokallaða niðasta trygdarnetið og hava borgarar, sum ikki hava nakað uppihaldsgrundarlag – t.d. frá arbeiði, øðrum tryggingarskipanum (t.d. ALS ella sjúkradagpeningi), inntøku frá hjúnafelaga ella ognum - rætt til fyribils hjálp sambært forsorgarlógini.

Fyrbils hjálp kann verða veitt sum ein bráðfeingishjálp, tá ein persónur kemur út fyri eini sosialari hending. T.d. samlívsslit, sjúka, og eisini persónar, sum detta úr øðrum skipanum. Tey, sum ikki hava rætt til fleiri dagar úr ALS ella sjúkradagpengaskipanini, kunnu søkja um fyribils hjálp, og eisini persónar, sum steðga við eini útbúgving, og tí ikki hava eitt inntøkugrundarlag av týdningi (sum gevur rætt til útgjald frá ALS), kunnu fáa fyribils hjálp.

**Veiting um mánaðin eftir skatt og gjøld, sbrt. forsorgarlógini**

| | |
|---|---|
| Forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum - búgva einsamøll | 10.600 |
| Forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum – sambúgvandi | 8.600 |
| 25 ár og eldri, uttan børn - búgva einsamøll | 9.200 |
| 25 ár og eldri, uttan børn - sambúgvandi | 6.500 |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr ikki hjá foreldrum | 5.400 |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr hjá foreldrum | 3.800 |

Viðm.: tey, sum hava børn, kunnu umframt veitingarnar omanfyri eisini fáa eina røð av barnastuðlum

Tað er eitt krav til teirra, sum fáa fyribils hjálp vegna arbeiðsloysi, at tey skulu í virknisvenjing. Talan er um eitt slag av aktivering,  sum vanliga varar í nakrar mánaðir. Tey, sum eru í virknisvenjing, fáa 1.000 kr. skattafrítt afturat veitingini omanfyri.

Hóast veitingin kallast *fyribils hjálp*, er ikki nakað mark fyri, hvussu leingi fólk kunnu fáa veitingina. Í flestu førum er talan um eina fyribils støðu, meðan bíðað verður eftir aðrari fyriskipan, ella at mann kemur úr tí sosialu støðuni. Einstakir borgarar fáa forsorgarhjálp í langa tíð.

### *Varandi veiting sbrt. forsorgarlógini*

Persónar, sum hava fingið fyribils hjálp í langa tíð, men sum ikki lúka krøvini til fyritíðarpensjón, kunnu í staðin fáa varandi veiting sbrt. forsorgarlógini. Vanliga er talan um persónar við víðfevndum misbrúkstrupulleikum, og tað skal vera mett útlitaleyst at fáa persónin aftur á arbeiðsmarknaðin.

Talan er um eina pensjónslíknandi veiting, og Almannaverkið er hildið upp at við royndini at fáa persónin aktiveraðan á arbeiðsmarknaðinum. Í løtuni eru bert tveir persónar, sum fáa varandi veiting. Veitingin er knappliga 9.000 kr. um mánaðin eftir skatt og gjøld.

*ALS og sjúkradagpengaveiting*

Tað eru borgarar, sum hava leyst tilknýti til arbeiðsmarknaðin, og sum hava í eitt fyribils tíðarskeið rætt til sjúkradagpengar ella veiting frá ALS. Hetta kunnu vera misnýtarar, sum hava óstøðuga inntøku, og sum tí bert hava rætt til heilt lítla veiting frá ALS ella sjúkradagpengaskipanini. Hesi kunnu undir ávísum treytum fáa ískoyti upp til satsirnar í fyribils hjálp.

*Fyritíðarpensjón*

Tey, sum hava varandi skerdan arbeiðsførleika, kunnu fáa tillutað fyritíðarpensjón. Fyritíðarpensjón kann veitast í trimum stigum – treytað av arbeiðsføri. Tey, sum hava eitt sindur av arbeiðsføri, kunnu fáa lægstu ella miðal fyritíðarpensjón, meðan tey, sum ongan arbeiðsførleika hava, kunnu fáa hægstu fyritíðarpensjón. Tað kemur so at siga ikki fyri, at persónar yngri enn 40 ár fáa tillutað lægstu- ella miðal fyritíðarpensjón. Persónar, sum hava eitt sindur av arbeiðsførleika, fara í staðin í eina fyriskipan eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

### 3.7.1 Samanumtikið – viðhvørt tørvur á hjálp at umsita viðurskiftini

Samanumtikið eru tað fleiri skipanir, sum kunnu tryggja fíggjarliga grundarlagið hjá teim ungu soleiðis, at tey kunnu uppihalda sær í Føroyum. Hinvegin er spurningurin, um tey ungu hava tørv á hjálp til at umsita sína inntøku soleiðis, at tey rinda fyri lívsins uppihald eins og tey kunnu gera avtalur í mun til at rinda skuld o.a. Arbeiðsbólkurin metir, at tað er upplagt, at Toymið fær til uppgávu at hjálpa teim ungu at søkja neyðugar veitingar og í heila tikið at fáa meira skipaði fíggjarviðurskifti.

## 3.8 Sosial sambond og frítíðarítriv týðandi leiklut

Sosial sambond hava týðandi ávirkan á lívið hjá ungum. Fleiri kanningar vísa, at sosialu sambondini hava ein týðandi leiklut í mun til viðgerðina av misnýtsluni hjá einstaka borgaranum. Tey eru týðandi í mun til, hvussu sinnaður borgarin er at fara í og verða verandi í viðgerð – og tískil kunnu sosialu sambondini hava stóra ávirkan á úrslitið av rúsviðgerðini. Harumframt vísir nýggj gransking frá eini kanning millum 3.500 danir at fólk, ið gera eitthvørt virkið, meiningsfult og eru saman við øðrum um hetta, hava upp til fýra ferðir hægri sannlíkindi fyri at hava eina góða sálarheilsu.

Av hesum ávum er tað týdningarmikið, at Toymið stuðlar teim ungu í at fáa og varðveita jalig sambond, ið kunnu stuðla undir eina fyri tey meiningsfulla  og innihaldsríka lívsførslu..

Ofta er borgarin í einari vónleysari støðu, har brýr eru brendar og sambond horvin. Avbjóðingin hjá myndugleikanum er tískil at eyðmerkja tey góðu sambondini og endurskapa tey sum ein part av tilveruni hjá borgaranum, eins og nýggj jalig sambond kunnu verða knýtt. Serligan týdning hevur familjan hjá viðkomandi í hesum høpi. Talan er bæði um, at borgarin verður stuðlaður í at liva í jaligum sosialum sambondum uttanfyri viðgerðina, og at ávís sosial sambond verða tikin við sum partur av sjálvari viðgerðini, eitt nú foreldur ella ein maki. Samstundis hevur tað týdning, at borgarin

verður stuðlaður í at minka um tey sosialu sambond, ið hava eina neiliga ávirkan á hann og eru avbjóðandi fyri jaliga úrslitið av viðgerðini.

Misnýtslan hjá borgaranum hevur ikki einans sálarsosialar (psykosociale) og sosiobúskaparligar (socioøkonomiske) avleiðingar fyri borgaran, men eisini fyri tey avvarðandi. Sum nevnt omanfyri, hava tey jaligu sosialu sambondini hjá borgaranum stóran týdning fyri jaliga úrslitið av viðgerðini. Tískil hevur tað týdning, at myndugleikin veitir tann neyðuga stuðulin til tey avvarðandi – bæði innan viðgerðin verður sett í gongd og aftaná, tá viðgerðin er endað – soleiðis tey avvarðandi hava orku at fremja teirra góða vilja.

Sosial sambond spretta ofta burturúr luttøkuni hjá fólki í ymiskum frítíðarítrivum. Tað at luttaka í felagslívi kann sum nevnt hava sera stóran týdning fyri sálarheilsuna hjá borgarum

Tað hevur eisini týdning, at tey ungu fáa eitthvørt gevandi og meiningsfult at gera í frítíðini, sum kann koma ístaðin fyri rúsevni og tey viðhvørt destruktivu lívsmynstrini hjá hesum menniskjum.

Nýggj gransking frá eini kanning millum 3500 danir vísir, at fólk, ið gera eitthvørt virkið, meiningsfult og eru saman við øðrum um hetta, hava upp til fýra ferðir hægri sannlíkindi fyri at hava eina góða sálarliga heilsu.

Úrslitini vísa, at felagsskapur hevur stóran týdning fyri sálarligu heilsuna. Um ein til dømis er partur av einum felagi, bólki ella organisatión, og er virkin í hesum hvørja viku, so er 75% størri møguleiki fyri, at ein hevur góða sálarliga heilsu, samanborið við, um ein ikki er partur av einum felagi, bólki ella organisatión.

Eisini vísir kanningin, at tað eru tvær til tríggjar ferðir størri sannlíkindi fyri góðari sálarligari heilsu, um ein er uppií onkrum, ið bjóðar einum av, arbeiðir fyri einum týdningarmiklum máli, arbeiðir sum sjálvboðin ella hjálpir onkrum á annan hátt.

Hetta er eingin løtt uppgáva, men ein máti er at fáa verandi frítíðarmøguleikar við í meira aktiv samstørv um hin einstaka. Til dømis ítróttarfeløg og aðrar felagsskapir, alt eftir, hvørji áhugamál tey ungu hava ella høvdu, áðrenn tey komu í verandi støðu. Men eisini onnur ítriv, so sum biografur, konsertir, ítróttardystir og onnur líknandi tiltøk.

Stuðulsfólkaskipanin hevur góðar royndir við at leggja til rættis sambond millum frítíðarítriv og tey ungu og eigur at verða bygt víðari á tær góðu royndirnar. Aðrastaðni eru eisini góðar royndir við skipanum har “ung hjálpa ungum”. Tankin við hesum er, at vælvirkandi ung - undir supervisión av fakfólki - verða knýtt at og gera ymiskt saman við teimum ungu við avbjóðingum. Á henda hátt fáa tey fyrimyndir, sum kunnu virka stimbrandi í mun til sosialu førleikarnar.

Toymið eigur avgjørt at arbeiða nógv við hesum partinum av lívinum hjá teim ungu. Royndir úr øðrum londum vísa, at tað ofta koma góð úrslit um arbeiðið bæði verður gjørt av teim professionellu og felagsskapum, sum finnast í nærumhvørinum. men eisini, at tey ungu eru partur av felagsskapum, sum finnast í lokaløkinum. Eitt nú skótar ella ítróttarfeløg.

Bólkurin er samdur um, at tað hevur týdning, at tað almenna miðar eftir, at tey ungu fáa fyrimyndir, heldur enn at hesi t.d. verða samlaði til eitt serligt frítíðartilboð til henda bólkin. Tað kann vera neyðugt og gott at byrja við, men við tíðini eiga tey ungu í størri mun at verða partur av teim tilboðum, sum onnur ung vanliga eru knýtt at. Tað er kanska eisini meira spennandi, at ein ungur sum hevur trupulleikar fær ein annan ungan at fylgjast við í biograf ella á café, heldur enn at fylgjast við einum starvsfólki.

## 3.9 Samstarv millum myndugleikar og skipan av tilboðnum

Bæði í Føroyum og londunum rundanum okkum verður javnan kjakast um, hvørt geira ábyrgdin er ein gongd leið ella ikki. Ført verður fram, at vandi er fyri, at ymiskir stovnar skúgva borgarar frá sær við geiraábyrgdini sum umbering, og at fólk detta niðurímillum tey ymisku økini. Hesin trupulleiki verður ofta umrøddur sum ein gráøkistrupulleiki ella ein markamótstrupulleiki, sum stendst av, at ivamál er um, hvør hevur ábyrgd av hvørjari tænastu, og hvør uppgávan hjá ymisku myndugleikunum er í mun til borgaran.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at miðast skal eftir, at allar tænastur – eisini tær sum verða veittar av øðrum myndugleikum - verða atkomuligar fyri flest allar borgarar. Øll eiga at hava ábyrgd av at geva fólki, sum hava umfatandi brek, javnbjóðis møguleikar og ikki einans teir stovnar og skipanir, sum eru undir málsøkinum hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum.

Hóast meginreglan um geiraábyrgd tryggjar, at tænasta verður veitt øllum borgarum, metir arbeiðsbólkurin tó eisini, at meginreglan um geiraábyrgd kann tykjast sum ein forðan fyri, at borgarin fær tænastu, við tað, at myndugleikar stríðast um uppgávu- og ábyrgdarbýtið, heldur enn at samstarva og samskipa uppgávuna. Tí er so sera umráðandi, metir arbeiðsbólkurin, at tað er so greitt sum gjørligt, hvør hevur ábyrgd av hvørjum tænastum soleiðis, at sleppast kann undan, at borgarin endar í einum gráøkistrupulleika, og tí ikki fær neyðuga tænastu.

Harumframt metir arbeiðsbólkurin, at tað er umráðandi, at myndugleikar eru sinnaðir at samskipa tær tænastur, sum teir hvør í sínum lagi hava ábyrgd av, og at yvirgangurin frá einum geira til annan fer fram undir skipaðum viðurskiftum.

Sum víst varð á í innganginum varð geiraábyrgdin staðfest í sambandi við lógarbroyting í 2014 og víst varð á týdningin av, at myndugleikar samstarva um tilboðini.

Í mun til tilgongdina at skipa sokallaði heildartilboð í Føroyum, er okkurt, ið bendir á, at myndugleikar og stovnar seinnu árini hava lagt orku í at fáa í lag fleiri heildartilboð. Hugtakið heildartilboð merkir, at borgarin alt í mun til tørvin fær eitt samlað tilboð, sum er samansett av ymiskum tænastum frá ymiskum myndugleikum og merkir ikki, at øll tænasta skal veitast av einum myndugleika ella á sama matrikkli. Í frágreiðingini "Tilmæli um tænastupolitikk" frá 2017 verður víst á, at tað er alneyðugt, at myndugleikar lyfta uppgávua í felag, um borgarar skulu fáa eina dygdargóða tænastu.

Í somu frágreiðing verður víst á, at størri dentur er lagdur á at fáa samskipað tænastur frá ávikavist Almannaverkinum, Psykiatriska deplinum, kommunum og skúlaverkinum/Sernámi, sum veita tænastur til somu borgarar og at fleiri góð dømi eru um, at myndugleikar og stovnar kunnu samstarva um heildartilboð í Føroyum. Víst verður m.a. á "Tann góða tilgongdin", "Serligt skipað miðnám" og "Bú- og viðgerðartilboð til ung við sálarligum avbjóðingum", sum eru góð dømi um, at myndugleikar kunnu samstarva og veita heildartilboð

Hesi heildartilboð byggja á skipað og formaliserað samstarv á øllum stigum, har landsstýrisfólk, embætisfólk, stovnsleiðarar og starvsfólk hava lagt dent á at fáa samstarvið at virka.

Arbeiðsbólkurin metir, at í mun til henda málbólkin, sum eru borgarar við umfatandi og samansettum sálarligum, sosialum og rús trupulleikum, er tørvur er á styrkja innsatsin, og at samstarvið millum myndugleikarnar gerst betri og meira skipað soleiðis, at hesi borgarar fáa eitt skipað heildartilboð

Tí mælir arbeiðsbólkurin til, at landsstýrið fer undir eitt felags átak, sum er málrættað hesum bólki, og at neyðug orka verður sett av til at skipa heildartilboð til hesi ungu. Fyritreytin fyri einum felags átaki er, at politisk semja er millum avvarðandi stjórnarráð, og at bindandi avtala verður gjørd, sum nágreinar, hvussu heildartilboðið skal skipast, og hvør hevur ábyrgdina av hvørjum. Harumframt er eisini alneyðugt, at skipanirnar undir einstøku stjórnarráðunum virka á nøktandi hátt, og at tað eisini á stovnsstigi er vilji til samstarv og samskifti.

Arbeiðsbólkurin vil somuleiðis vísa á týdningin av, at framhaldandi verður arbeitt við at menna aðrar skipanir, sum hava til endamáls at fyribyrgja, at tey ungu fáa trupulleikar. Eisini er umráðandi, at støðugt verður arbeitt við at menna tær skipanirnar, sum veita tænastur og viðgerðir til ung, sum hava trupulleikar og at tað verða skipað fleiri bú- og viðgerðartilboð í Føroyum, sum hava til endamáls at menna og stuðla ungum, sum hava tað soleiðis, og at tey ungu kunnu fáa hjálp, áðrenn trupulleikarnir gerast ov umfatandi.

# 4. Tilmæli um skipan av tilboði

Í mun til henda málbólkin, vil arbeiðsbólkurin vísa á, at tilboðið, sum mælt verður til, hevur til endamáls at viðgera og hjálpa einum málbólki, sum hevur umfatandi og samansettar trupulleikar. Arbeiðsbólkurin metir, at ein altavgerandi faktorur í at røkka teimum ungu er, at talan verður um eitt sokallað lág-gáttartilboð, har dentur verður lagdur á einfalda og lætta atgongd til tilboðið.

Orsakað av, at talan er um ung fólk, sum í dag hava umfatandi trupulleikar, er alneyðugt at byrjað verður skjótast til ber. Umboð fyri avvarðandi myndugleikar eiga at hava møguleika at fáa borgarar undir "Toymið". Ein møguleiki er, at byrjað verður við teim ungu, sum longu eru kend av teim ymisku myndugleikunum, og at skipanin við tíðini verður ment og opin fyri øðrum ungum.

Arbeiðsbólkurin mælir staðiliga til at seta inn við fyribyrgjandi átøkum og at styrkja tað arbeiðið, sum SSP, Bláikrossur, Fólkaheilsuráðið, Barnaverndartænastur o.s.f.r. longu gera, soleiðis, at vit í Føroyum kunnu fyribyrgja, at børn og ung koma so illa fyri.

Eisini er umráðandi at hildið verður áfram at fáa til vega fleiri bú- og viðgerðarstovnar til ung í Føroyum, og tað er sera umráðandi, at tey ungu, sum hava tørv á tí, fáa bú- og viðgerðartilboð, áðrenn trupulleikarnir gerast ov umfatandi. Harumframt er sera umráðandi, at Almannaverkið, Psykiatriski depilin og skúlaverkið sum heild fáa neyðugar karmar til at kunna lofta teim ungu so tíðliga, sum gjørligt.

## 4.1 Tvørgeiraligt átak

Mælt verður til at farið verður undir eitt átak, sum hevur til endamáls, at tey ungu stig- og miðvíst kunnu fáa eitt fyri tey virðiligt, skipað, rúsfrítt og innihaldsríkt lív.

Av tí, at tað eru borgarar við ymiskum tørvi, og at tað eru ymiskir myndugleikar, sum hava ábyrgd av at veita stuðul, hjálp og viðgerð til omanfyrinevndu viðurskifti, metir bólkurin, at neyðugt er at gera individuellar viðgerðarætlanir fyri hvønn einstakan saman við tí unga.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at átakið verður skipað sum ein royndarverkætlan við einum tvørfakligum og tvørgeiraligum toymi, sum í felag møtir borgaranum, har hann er. Bólkurin mælir til, at eitt tvørfakligt toymi við heilsufakligum, sosialfakligum og námsfrøðiligum førleikum verður sett, sum arbeiðir úti har borgarin er og møtir borgaranum har viðkomandi er. Talan er um sokallaðar "Gadeplansmedarbejdere", sum í stóran mun hava til uppgávu at ferðast í umhvørvinum, har tey ungu, sum hava trupulleikan, eru, at skapa samband við tey ungu, og at skapa samstarv/samband millum ymsu myndugleikarnar og tey ungu.

## 4.2 Viðgerðarætlan

Arbeiðsbólkurin metir, at tað hevur alstóran týdning at seta realistisk mál í hesum høpi. Tað merkir, at setast skulu styttri mál og longri mál. Endamálið er, at hesi kenna seg at eydnast og ikki at miseydnast. Verða broytingar gjørdar, skulu hesar vera lagaligar.

Bólkurin er samdur um, at individuell viðgerðarætlan skal gerast fyri hvønn borgara og skal henda viðvirka til, at tann ungi fær eina heildarviðgerð og skal samskipa tær tænastur/viðgerðir, sum tann ungi fær frá ymiskum myndugleikum. Í Svøríki hava tey góðar royndir við einum SIP-plan, sum er ein viðgerðarætlan, sum samskipar ymisku tilboðini og viðgerðirnar, sum borgarin hevur tørv á og fær. Tað eru ymiskir myndugleikar, sum hava ábyrgd av sínum parti av viðgerðini og ger ætlanin greitt, hvør hevur ábyrgd av hvørjum og nær tey einstøku átøkini skulu fremjast.

Í Føroyum hava vit royndir við "Tí góðu tilgongdini", sum er ein samstarvsleistur millum myndugleikar og er málrættaður familjum við børnum við autismu. Viðgerðarætlanin verður gjørd saman við borgaranum, sum eisini hevur ávísar uppgávur/pliktir, sum viðkomandi skal gera. SIP-planurin er líkur tí, sum verður gjørd í tí góðu tilgongdini.

## 4.3 Skipan av átakinum

Bólkurin mælir til, at talan verður um eina tvørgeiraliga verkætlan, sum allir partar "eiga" saman við borgarunum. Fyri at tryggja, at allir partar kenna ognarskap av verkætlanini, verður mælt til, at ein stýrisbólkur við umboðum fyri avvarðandi myndugleikar verður settur.

Uppgávan hjá bólkinum er fyrst og fremst at skapa og fasthalda sambandið millum borgaran og Toymið og at samskipa tænastur og viðgerðina. Harumframt skal bólkurin vera ráðgevandi hjá "Toyminum" í mun til fakligar spurningar/vegleiðingar og skal hjálpa "Toyminum" at arbeiða tvørfakligt. Eisini skal bólkurin tryggja, at avgerðir, sum krevja politiska ella prinsipiella støðutakan, verða sendar rætta viðkomandi myndugleika.

Bólkurin skal mannast av:

- Umboðum fyri psykiatriina á Landssjúkrahúsinum – psykiatri/sálarfrøði
- Umboðum fyri Kriminalforsorgina
- Dagliga leiðaranum av Toyminum
- Umboðum frá Mentamálaráðnum
- Umboðum fyri sosialráðgeving Almannaverkið
- Umboðum fyri leiðsluna í Almannaverkinum

Neyðugt er, at allir myndugleikar binda seg til at vera við í verkætlanini og at fastar avtalur verða gjørdar um, hvør ger hvat í mun til tann einstaka borgaran.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at "Toymið" eigur at verða skipað undir Almannaverkinum, sum hevur drúgvar royndir við at seta saman tilboð og sum eisini umsitur eina røð av veitingum og tilboðum/tænastum, sum hesir unglingar fáa ella fara at fáa frá Almannaverkinum.

Hinvegin hevur tað sera stóran týdning at viðurkenna, at Almannaverkið kann tykjast sum ein stór, tung og stirvin skipan, sum ikki megnar at røkka hesum borgarum við núverandi strukturi. Tískil er neyðugt at bróta upp úr nýggjum í mun til organisering av átakinum.

Bygnaðarliga verður "Toymið" skipað undir Almannaverkinum og ein játtan verður ásett, sum fíggjar starvsfólkalønir, keyp av tænastum og leigu av íbúðum/hølum v.m. til borgaran.
Tað er týdningarmikið, at leiðarin fyri "Toymið" og átakið hevur heimild til sjálvur at taka avgerðir og at leiðarin hevur fíggjarligt rásarúm til at finna alternativar loysnir fyri borgaran.

## 4.4 Starvsfólkahópur

Mett verður, at tørvur er á einum starvsfólkabólki við 4-5 fólkum umframt at møguleiki skal vera fyri at keypa tænastur frá privatum sálarfrøðingum, lívsstílsserfrøðingum og fyritøkum, sum skipa fyri ymiskum upplivingum - sokallaðum "adventures" í náttúrini har tey ungu kunnu vegleiðast/hjálpast til at flyta seg við hjálp frá náttúru upplivingum.

Talan verður um arbeiði, sum ikki er siðbundið, soleiðis at talan er ikki um eitt starv, sum er bundið at einari ávísari staðseting og/ella tíðarkarmi. Hetta kann gerast ein avbjóðing í mun til verandi starvsfólkaviðurskifti og sáttmálar, sum fakfeløg hava.

Tískil er neyðugt at hava starvsfólk, sum umframt at hava rættar fakligar førleikar, eisini hava eginleikar til at møta borgarum har viðkomandi er, og megna at arbeiða uttanfyri vanligar siðbundnar karmar/rammur. Eisini er umráðandi, at tey starvsfólk, ið sett verða, brenna fyri sakini – eru sokallaðar eldsálir, sum kunnu arbeiða skeivar tíðir og sum kunnu tola at vera burtur heimanífrá í avmarkað tíðarskeið.

Tískil mælir bólkurin til, at samskift verður við avvarðandi fakfeløg um starvsfólkaviðurskiftini í breiðasta týdningi, soleiðis at starvsfólkahópurin hóskar til verkætlanina.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at toymið fer undir at skapa møguleikar fyri, at onnur ung, sum sjálvi hava verið í líknandi støðu, verða brúkt til at fáa samband við tey, sum hava trupulleikar og at stuðla teimum ávegis at megna egið lív.

## 4.5 Kostnaðarmeting

Arbeiðsbólkurin hevur í sambandi við fíggjarlógarsamráðingarnar fyri 2018 víst á, at tað var torført at koma við eini nágreiniligari kostnaðarmeting, tí tilmælini leggja upp til ein nýggjan og øðrvísi hátt at arbeiða við málbólkinum, enn vit eru von við.

Landsstýriskvinnan varð tó kunnað um, at eitt útgangsstøði kundi verið eitt bú- og viðgerðartilboð í Føroyum, sum hýsir fimm ungum við umfatandi sálarligum avbjóðingum. Játtanin til tilboðið er áleið 7 mió.kr. Tilboðið er normerað til 10 starvsfólk.

Játtan varð ikki sett av til at skipa tilboð til málbólkin á fíggjarlógini fyri 2018 og arbeiðsbólkurin vil vísa á, at skulu hesi ungu loftast, er neyðugt at raðfesta átakið á fíggjarlógini. Arbeiðsbólkurin vil tó eisini vísa á, at tilmælið í stóran mun leggur upp til, at verandi tilboð og tænastur verða gagnnýtt, heldur enn at stovnseta eina røð av nýggjum tilboðum. Arbeiðsbólkurin mælir tó til, at ein serstøk játtan verður sett av til Toymið.

Tað er sera torført at meta um samlaðan kostnað av Átakinum, tí vit hava ikki líknandi skipan at samanbera við og vit vita ikki nágreiniliga, hvussu nógva hjálp og stuðul tey ungu fáa frammanundan, hvussu nógva hjálp tey skulu hava og hvussu longi henda hjálpin skal veitast.

Sum lýst er í parti 2, er samlaða játtanin til bú- og viðgerðartilboð í 2018 út við 30 mió.kr. og dagsprísurin liggur millum 40 kr. og 10.644 kr. Arbeiðsbólkurin metir avgjørt, at stórur partur av teim ungu, sum tilmælið fevnir um, liggur í tí dýrara endanum, um tey fingu stovnspláss uttanlands ella í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at farið verður undir eina royndarverkætlan og at tað í fyrstu atløgu verða settar 4 -5 mió.kr. av til endamálið. Játtanin skal brúkast til at fíggja 4-5 starvsfólk við sosialfakligari, námsfrøðiligari og heilsufakligari útbúgving. Hvørt starvsfólk kostar áleið 450 t.kr. um árið. Harumframt er neyðugt at hava játtan til at keypa tænastur, leiga hølir/íbúðir og førleikamenning av starvsfólkum.

Samanlagt metir arbeiðsbólkurin, at 4 – 5 mió. kr. eiga at verða settar av til ”Átakið” í fyrsta umfari. Til samanberingar kann nevnast, at bú- og viðgerðartilboð sum rúmar fimm borgarum, hevur eina játtan áljóðandi 7 mió.kr. og tað starvast 10 fólk við ymiskari fakligari bakgrund. Vart skal tó gerast við, at hesi tilboðini ikki eru beinleiðis sambærilig, tí tørvurin er øðrvísi og krevur øðrvísi tilrættalegging.

Men verður hugt eftir útreiðslunum til tilboð, sum áður hava verið keypt uttanlands so sæst, at talan hevur verið um kostnaðarmikil tilboð.